ítróttur

Nr. 244 • hósdagur • 19. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

HIK Aalborg – Holte IF: 2-3 (23-25, 24-26, 25-21, 25-23, 18-20):

# Bárður er danskur steypa-vinnari



Bárður Mikkelsen er nú danskur steypavinnari í flogbólti. Eftir at Holte hevur staðið í skugganum í fýra ár, vann liðið seg týskvøldið aftur ovast á danska flogbóltspallin við sigri í steypafinaluni

**Í triðja dystarbóltinum – og eftir at hava havt fýra slíkar ímóti sær – eydnaðist tað týskvøldið mansliðnum hjá Holte at vinna donsku steypafinaluna í flogbólti**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Bárður B. Mikkelsen skrivaði týskvøldið ein part av føroyskari flogbóltssøgu, tá hann saman við liðfeløgunum úr Holte var við til at vinna donsku steypafinaluna í Flogbólti.

Dysturin, sum varð vístur beinleiðis á Viasat, varð sum sagt leiktur seint í gjárkvøldið, so eftir ein langan busstúr heim, var klokkan so smátt farin at nærkast fýra, áðrenn móðu leikararnir vóru við hús aftur.

### Sannur gysari

Tí var tað eisini ein heldur Bárður Mikkelsen, sum tók telefonina mikumorgunin, men kortini var gleiðin um sigurin ikki til fara skeivur í.

- Hatta er so helst nakað, sum tú bara upplivur einaferð. HIK Aalborg hevði fýra ferðir matcbólt móti okkum í fimta settinum, men hvørja ferð kiksaði tað hjá teimum. Vit høvdu eisini okkara møguleikar við trimum matchbóltum, men trijðu ferð eydnaðist tað so, greiðir Bárður frá.

Um sjálvan dystin sigur hann annars, at her var talan um ein sera javnan dyst.

- Vit vunnu tey bæði fyrstu setttini, og vit høvdu eisini sera góðan møguleika at avgera í fjórða settinum, men yvir høvur var talan alla tíðina um jøvn sett. Tað var ongan tíð soleiðis, at eitt sett tóktist avgjørt, áðrenn vit komu onkra staðni upp í 20'ni.

- Eg má tó viðganga, at tá vit taptu fjórða settið, so var tað um reppið, at vit mistu trúnna upp á sigurin. Vit vóru á odda 23-18, men kortini fingu teir vent hesum, soleiðis at farast mátti út í fimta sett.

Og hetta gjørdist sum sagt spennandi. Mistøkini frá báðum liðum vóru nógv í tali. Millum annað misti HIK tveir av sínum dystarbóltum við at serva í netið, og Holte gjørdi tvær ferðir feil í blokkinum, áðrenn tað at enda eydnaðist at sláa seinasta dystarbóltin í gólvið.

### Fyrireiking losyti seg

Sum vit hava nevnt nakrar ferðir í seinastuni, so hevur Holte roynt seg við eitt sindur alternativum uppstillingum í seinastu dystunum í grundspælinum. Liðið hevur í heyst mist ein kantspælara, sum er seldur til Portugal, og tá víðari luttøkan í landskappingini longu var tryggjað, varð hildið vera skilabest, um nýggj álopsvápn vórðu vand.

Og hetta hevur eisini givið úrslit. Fyrst og fremst hevur nýggja uppstillingin singnið út uppá at umskúla ein miðspælara til kant, og somikið væl hevur gingist, at hesin sami leikarin eftir dystin týskvøldið varð kosin sum ársins pokal-fightari av donsku ítróttarpressuni.

### Óvæntaður eykavinningur

Hetta er fyrsta ferðin í fýra ár, at Holte vinnur donsku steypakappingina. Undan hesum hevði felagið í eitt tíggju-ára skeið verið totalt dominerandi í donskum mansflogbólti við 10 greipusigrum á rað, og tí e einki at siga til, um seinastu fýra árini hava tókst heldur soltin hjá leiðsluni í felagnum.

At kvinnurnar hjá felagnum longu undan mansfinaluni høvdu tryggjað sær sín sigur steypakappingini, mundi ikki gera lagið verri í so máta, og Bárður ivast heldur ikki, tá vit so spurdu, hvussu lagið hevði verið í bussinum.

- Nú var tað kanska dekan ov seint, men sjálvandi var lagið framúr. Eg haldi næstan, at tað var stuttligari hjá leiðsluni enn hjá okkum leikarum, nú liðið endiliga vann aftur. Teir hava roynt og roynt, og nú er liðið so endiliga aftur ovast á sigurspallinum.

- Hjá okkum var tó eisini annað at fegnast um. Steypakappingin verður í ár stuðlað av týska Lufthansa, og teir høvdu ein heilt serligan vinning til liðini. Vinnandi liðið vann nevnliga eisini 17 ferðaseðlar, sum vit kunnu brúka sum okkum lystir, so tað er helst einki at ivast í, at vit øll fara onkra staðni at ferðast, tá landskappingin er av einaferð í vár, sigur Bárður.

Nú klokkan gjørdist so nógv týskvøldið, varð einki hátíðarhald fyriskipað fyri leikarunum, tá ferðalagið kom heimaftur, men fríggjadagin skuldi stór veitsla haldast fyri liðunum báðum. Hesari verður Bárður tó ikki við á, tí longu hósdagin fór hann heim til Føroya at halda jólafrí, áðrenn leiðin beint eftir nýggjár gongur niður aftur. Endaspælið í donsku elitudeildini byrjar annað vikuskiftið í januar.





Jákup Dam – sum her sæst í dysti móti einum øðrum veterani – varð við sínum 10 málum ein av høvuðsorsøkunum aftan fyri sensatiónina hjá KÍF. Jákup Símun Simonsen, sum er hin leikarin á myndini, var annars dómari í dystinum

KÍF III – Neistin 39-32 (18-15):

# Sensatión í Hoyvík

**Tað kann væl vera, at Neistin hevur besta fyrstu dieldarliðið í høvuðsstaðnum, men móti triðju deild hjá KÍF munaði hetta lítið**

COCA-COLA KAPPINGIN, MENN
*Jákup Mørk*

- Og so fegnist eg eisini um, at vit hava eitt triðjudeildarlið við fleiri evnaríkum leikarum.

Nakað soleiðis segði KÍF venjarin, Kári Durhuus fyrr í heyst, tá vit tosaðu við hann um besta mansliðið hjá KÍF.

Og at nakað er um hetta, varð so dyggiliga staðfest í Hoyvíkarhøllini týskvøldið. Beint móti øllum forsøgnum, vónum og ætlanum, so eydnaðist tað nevnliga triðju deildar liðnum hjá KÍF at vinna ein greiðan sigur á besta neistaliðnum, sum annars er partur av tætta oddastríðnum í bestu deildini.

### Einki roks

Og talan var eisini um ein greiðan sigur. Neistin hevði annars allar tær vanligu kanónirnar við til dystin, og tí átti tað á pappírinum ikki at verið nakar ivi um, hvør vinnarin skuldi verða.

Tað var tó rættiliga skjótt, at kollfirðingarnir fingu staðfest, at so væl spældi klaverið nú heldur ikki. Ongan tíð lótu teir Neistan sleppa at renna frá sær, og móti endanum av fyrra hálvleiki fingu teir eisini strítt seg framum.

Og har blivu teir so eisini verðandi. Neistin royndi í sínum lag at svara aftur, men tað eydnaðist alla tíðina kollfirðingunum at halda muninum, og um miðjan hálvleikin skrædnaði so. Í eini seinastu roynd at venda gongdini royndi Neistin seg við einum time-out, men hdlru ikki hetta hjálpti. Sjálvsálitið hjá heimaliðnum var nú somikið stórt, at líkamikið hvussu bláu menninir royndu at gera, so gjørdist kortini einki, og tó at Neistin seinastu fimm minuttirnar fekk pyntað nakað um, so vikaði hetta ikki trygga sigurin hjá kollfirðingum.

Soleiðis noyðist Neistin longu nú at siga farvæl við vónina um ein sigur í steypakappingini, og tað er einki at ivast í, at hetta er dyggur smeitur fyri felagið, eftir at teir annars hava verið partur av tveimum av teimum trimum seinastu finaludystunum.

Kollfirðingar kunnu hinvegin erpa seg sum rættir giant-killers. Helst eru tað ikki mong, sum geva teimum nakran sum helst møguleika at vinna seg fram í finaluna, men tað hóvar teimum helst heilt væl. Tað vóru nú heldur ikki so nógv, sum roknaðu við teimum týsdagin.

Og so kunnu tey í Neistanum helst reypa um at eiga besta liðið í Havnini. Havnin telir eisini Kollafjørð, og betri enn teir næstbestu har vóru neistamenninir so ikki.

### Dysturin í tølum

**KÍF III-Neistin 39-32 (18-15)**

Málskjúttar:
KÍF: Jákup Dam 10(3), Suni Davidsen 6, Jón Sigurð Gleðisheygg 6, Teitur Joensen 5, Frírik Joensen 5, Gert Hansen 3, Jens Marni Hansen 3, Jens K. Magnussen 1
Neistin: John Petersen 9(2), Morgan Knezevic 8, Ragnar Stakksund 6, Helgi Justinussen 6(2), Dann Thorleifsson 2, Kári Mortensen 1
Brotskøst: KÍF 3, Neistin 5
Útvísingar: KÍF 5
Dómarar úr H71: Jákup Símun Simonsen & Hallur Danielsen.

VÍF-H71 36-28 (20-14):

# Eingin slingur í valsinum

**Vestmenningar lótu ongan iva vera eftir, tá teir við greiðum sigri á H71 bíløgdu sær pláss í hálvfinaluni í steypakappingini**

COCA-COLA KAPPINGIN, MENN
*Jákup Mørk*

Tað vóru ikki meira enn einir tíggju minuttir leiktir av dystinum týskvøldið, áðrenn VÍF hevði sagt, hvar skápið skuldi standa. Úr 4-4 fóru VÍF upp á 10-4, og so var í veruleikanum ongan tíð nakar spenningur aftur í dystinum.

Onkun tíð tóku teir á heimaliðnum sær kanska av løttum, men hvørja ferð hoyvíkingarnir høvdu hug at nærkast nakað, varð skrúvan táttað eitt vet, soleiðis at munurin aftur varð øktur.

Soleiðis hevur VÍF tryggjað sær, at teir verða við í pottinum, tá HSF í næstum fer at kasta lut um, hvussu liðini skulu parast í hálvfinalunum. Har sleppa hoyvíkingar so upp í part, men um ikki annað, so kunnu teir troysta seg við, at við hesum steypadystinum á skránni fekk vanligi fyrsti-málverji teirra, Petur Magnusson, sitið sítt leikbann av sær, soleiðis at hann er tøkur, tá hoyvíkingar um vikuskiftið fara til Runavíkar.

### Dysturin í tølum

**VÍF-H71 36-28 (20-14)**

Málskjúttar:
VÍF: Agnar Joensen 9, Áki Olsen 7, John Zachariasen 6, Piti Negru 6(4), Ingi Olsen 4(1), Áki G. Olsen 2, Ólavur Brimnes 1, Fríðbjørn Seloy 1
H71: Bjarni Wardum 8(3), Johnny Durhuus 7, Halgir Dahl Olesen 6, Esbern Patursson 2, Tróndur Vatnhamar 2(2), Jákup á Borg 1, Bárður Brimvík 1, Niels Viggo Niclassen 1
Brotskøst: VÍF 5, H71 6
Útvísingar: VÍF 2, H71 3
Dómarar úr Tjaldur: Trygvi Mortensen & Kári Hansen